# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.08.2017*

**<u>Bygdaráðsfundur: 29.08.2017 kl. 18.00 til kl. 18.15</u>**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Mál nr. 61/2017 Ognir og hølir</u>**

<u>J.nr. 82.00.00-P20-1-17</u>

**Málslýsing**

Høll til Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið (SKS)

Hølisumstøðurnar hjá SKS eru trongar og hevur SKS nú møguleika at keypa ein bygning á Skála, sum kann hýsa part av virkseminum hjá SKS.

Íløgukostnaðurin verður at býta javnt eftir íbúgvartalinum í Runavíkar-, Nes- og Sjóvar kommunum. Kostnaðurin fyri Nes kommunu er kr. 493.511.

**Tilmæli**

Á fundi 23.08.2017 mælir Fíggjarnevndin til, at peningurin, fyri høllina, verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 62/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið</u>**

<u>J.nr. 18.15.00-S49-1-16</u>

**Málslýsing**

Í skrivi 07.08.2017 takkar nevndin fyri Ungdómshúsið Nes Kommunu fyri stóra vælvild og gott samstarv við at finna loysn á hølisspurninginum, nú "Banknordik-bygningurin" varð seldur.

Í samband við flytingina er neyðugt at keypa ymiskt nýtt, og hevur Ungdómshúsið fingið heimasíðu: www.uh.fo. Søkt verður um at veita Ungdómshúsnum eyka stuðul áljóðandi kr. 20.000,00.

**Tilmæli**
Á fundi 17.08.2017 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Ungdómshúsinum eyka stuðul áljóðandi kr. 20.000,00.

Á fundi 23.08.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 63/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugeðir**
J.nr. 02.34.02-P20-16-17
**Málslýsing**
Í skrivi 21.07.2017 søkir borgari um at fáa grundstykki at byggja eini sethús á, møguliga tvíhús. Økið, hugsað verður um, er niðanfyri Heygsveg, burtur av matr. nr. 415a.

**Tilmæli**
Á fundi 15.08.2017 mælir Tekniska nevnd frá at játta umsóknini, tí Nes kommuna hevur ætlanir um, at íbúðir verða bygdar á hesum øki.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 64/2017 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.03.00-P20-1-17
**Málslýsing**
Í skrivi 27.07.2017 er komin fyrispurningur um loyvi kann fáast til at broyta byggiháttin á neystunum í "Krabbaurð".

Ætlanin er at broyta neystini soleiðis, at tey fáa flata tekju. Hallið skal verða frá vestri ímóti eystri

**Tilmæli**
Á fundi 15.08.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta umsóknini treytað av, at Landsverk tekur undir við ætlanini. Landsverk eigur undirlendið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.